# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



28. februar fingu Linda Sif Baldvinsdóttir, Argir og Henning Sørensen, Trongisvágur ein son. Hann er 53 cm og vigar 3000 gr.



22. februar fingu Annika og Høgni Zachariasen, Leynar, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3950 gr.

**Føðingar**

11. februar fingu Katrin og Hans Pauli Sjóstein, Klaksvík, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4900 gr.

19. februar fingu Jenny Petersen og Magnus Samuelsen, Funningur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3400 gr.

20. februar fingu Herborg Líggjasardóttir Johannesen og Rúni Magnus Johannesen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3850 gr.

21. februar fingu Mariann Ejdesgaard og Gestur Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3970 gr.

21. februar fingu Eileen og Gudmundur Hammer Egholm, Vestmanna, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3930 gr.

23. februar fingu Asbjørg Selfoss og Hallur Súni Danielsen, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3535 gr.

23. februar fingu Turið Hovgaard og Luis Zambrano, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3100 gr.

24. februar fingu Line L. Larsen Keypmannahavn og Jógvan Drangberg Skopun, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3380.

25. februar fingu Helena Gásdal Sørensen og John Karstensen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 2850 gr.

27. februar fingu Elsa og Hugo Leo, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4550 gr.

27. februar fingu Hansina Miðalberg Eliasen og Paul T. Nielsen, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3300 gr.

27. februar fingu Tóra Simonsen og Herbert í Lon Jacobsen, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3150 gr.



23. februar fingu Anja Klæmintsdóttir og Sam Jacobsen, Syðrugøta, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3500 gr.

**Prógv**

25. januar tók Hanna M. Djurhuus, Tórshavn prógv sum fysioterapeutur á Fysioterapiskúlanum í Keypmannahavn.

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

# Stina Bech 50 ár



*Stina Bech saman við ommudøtrum*

Føðingardagsheilsan til Stinu Bech í Vági á 50 ára degnum.

Góða Stina, hjartaliga tillukku við føðingardegnum, mátti tær unnst nógv góð ár framyvir.

Tá eg hugsi um teg og tína familju, so er tað um gott grannalag og trúfesti.

Nógv góð baranminnir renna fram fyri meg um nógvar huganligar, stuttligar og álvarsligar løtur saman.

Hetta vil eg nýta høvið at takka tær og ikki minst mammu tíni so inniliga fyri, løtur og minnir sum hava havt stóran týðning fyri meg.

Eitt er, at vit eru í familju báðar, bæði gjøgnum ommuna og abban, so tey hava altíð kenst, samstundis eru vit so hepnar at næsta ættarliði eisini sampakkaði.

Hugsi um nú sum vaksin týdningin av at eg kundi fara inn í grannahúsið og føla meg sum heima. Haldi ikki tað var dagur vit ikki sóust, antin so ella so.

Var tað ikki at lána okkurt, so at fortelja tað síðsta nýggja, ella bara ein góðan kaffimunn, tað at hava umsorgan fyri hvør øðrum, jú vit komu hvør øðrum við.

Tykkara hús var eitt samlingshús. Frá barnsbeini av var tú von við at nógv fólk komu á gátt hjá tykkum, og hví var tað so, sjálvandi tí at øll føldu seg so væl. Jú har er mangt mál havt á lofti, og dúgliga kjakast, oftani bleiv eisini spælt kort.

Minnist hvussu stolt eg var, tá eg slapp at trilla teg í barnavogni. Tá vit runnu oman í Vaskiskúrin á Gørðunum við varmafløsku við kaffi til mammu tína.

Minnisthvussu øvundsjúk eg var, tí eg ikki var so heppin í sum tú at eiga so nógvar pápabeiggjar sum fiskaðu og seldu teirra førning í t.d. Skotlandi. Tá teir so komu aftur við dukkuvognum, dukkum og alskyns leikutoy, fyri ikki at gloyma dropsini og karamellurnar.

Tú ert einabarn og giftust einum einabarni, Evaldi. Tú giftist ung, og væl hevur borið til tykkara millum. Tit bæði eru vælsignaði við 6 børnum og 6 ommu- og abbabørnum. Eisini eru tit so heppin, at flest øll børn tykkara búgva har suðuri.

Stina, takk fyri gestablídni tá eg eri har suðuri, takk fyri at tú altíð er so hjálpsom, tá eg ringi og spyrji spurningar um tað sum fyriferst í heimbygdini, snøgt sagt ert tú og tín familja mítt bindilið til mína familju og uppruna í Vági..

Alt tað besta ynski eg tær og tínari familju.

**Bjørghild við familju.**

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara kæri bróðir og gubbi

**Poul Johannes Johannesen**

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til prest og Kristian Fríðrik og eisini eina tøkk til Leif fyri sang í kirkjuni.
Tøkk til deild M á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.
Tøkk fyri blómur og kransar.
Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjurnar vegna*
**Øggi, Mary og Nils**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá mín elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Thorbjørn Djurhuus**

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til heimarøktina, sambýlið, læknarnar og starvsfólkið á Suðuroyar Sjúkrahúsi, prest, sangarar og gravara.
Tøkk fyri blómur, kransar og tit, sum gjørdu ervið.
Tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjurnar vegna*
**Gunhild, Irdi og Gunn**